

# Plúmm aftur á pallin

**Tónleikabólkurin Plúmm er aftur konsertaktuellur. Konsert verður hóskvøldið kl. 20 á Gamla Meiarínum í havn**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Nú, Prix Føroyar og Atlantic Music Event eru farin aftur um bak, fáa flestu tónleikararnir, ið luttóku, sær ein væl uppiborinan steðg.

Hesin steðgur verður tó stuttur hjá Rógva á Rógvu og Arnold Ludvig, sum vóru millum virknastu tónleikarar í Prix Føroyum. Teir skulu nú aftur í eldin á palli, og hesuferð verður tað við bólkinum Plúmm. Konsertin verður hóskvøldið 28.04 kl.20 á Gamla Meiarínum í havn.

Teir, ið manna bólkin umframt Rógva og Arnold, eru Magnus Johannesen, tangentar og Leivur Thomsen, guitar.

### James verður við

Afturat sær hava teir fingið James Olsen, sum higartil hevur sitið aftanfyri trummurnar í Showmonnum. Hesuferð er hann við Plúmm sum forsangari.

James hevur fyrr verið partur av bólkinum. So langt síðani sum í 1981 vann bólkurin eina tónleikakapping í SMS undir navninum ’Playboys’. Manningin var tá tann sama sum nú, burtursæð frá, at Finnur Hansen spældi við. Hesuferð verður Finnur Hansen tó við sum ljóðteknikkari.

Atgongumerki fáast í forsølu á Kunningarstovuni og við dyrnar á Gamla Meiarínum.

1799 HK

Leygarkvøldið spæla

EXPRESS

Staðið har bestu føroysku tónleikabólkarnir spæla Beatles og annan góðan 60'ara tónleik

HAVNAR KLUBBI Stovnaður 1799



Hóskvøldið 28.04 til sunnukvøldið 01.05

Trubadururin
Andrew Joseph

Thai Buffét
týsdag til fríggjadag frá 12.00 til 14.00

CAFÉ NATÚR

REX



FRÍGGJAKVØLDIÐ 29.04

Trubadururin
Andrew Joseph

Aldursmark 18 ár